*Tíðin er komin at ásanna at Føroyar broytast ikki grundleggjandi av at sandoyingar sleppa lættari til Havnar. Men Føroyar broytast grundleggjandi av at føroyingar sleppa lættari úr Føroyum til evropeiskar og amerikanskar stórbýir*

toyggja føroyska samfelagið til eisini at hýsa hesum heimsumfatandi netverki, kunnu Føroyar gerast ein sterk eind í globaliseraða heiminum.

### Føroyar sum mentunarlig eind

Fyrst og fremst er neyðugt at vit broyta hugburðin um føroyingar uttanlands. Higartil hevur gongdin við vaksandi fráflyting og minkandi hugi millum útisetar at flyta heimaftur verið sædd sum ein stórur trupulleiki. Føroyingar skulu heim aftur eftir lokna útbúgving og ongantíð ov skjótt, tykist samda politiska herrópið at vera, hóast tað er ein sannroynd, at útbúgving í sjálvum sær er lítið verd uttan praktiskar royndir.

Men hetta er ein avmarkandi háttur at skilja, hvat Føroyar kunnu fáa burturúr teimum, sum fara av landinum at útbúgva seg ella arbeiða. Veruleikin er tann, at lesandi, sum koma aftur til Føroya beint eftir lokna útbúgving, oftast eru líka óvitandi um praktisku viðurskiftini innan vinnuna og tað almenna sum tey vóru, tá tey fóru úr Føroyum av fyrstani tíð. Tey flestu høvdu gjørt Føroyum eina stóra tænastu við at verið uttanlands eitt sindur longr, arbeitt eina tíð og síðan borið nýggjar royndir og mannagongdir við sær heim, heldur enn bert tann bókliga lærdómin.

Veruligi trupulleikin fyri Føroyar er ikki, at føroyingar fara uttanlands at útbúgva seg ella arbeiða, men at føroyingar uttanlands eru ov avskornir frá at luttaka í tí, sum fyrifarst í Føroyum - og øvugt at Føroyar eru ov avskornar frá at gagnnýta vitanina og mentunarliga íkastið frá landsmonnum uttanlands.

Fyrsta stig fyri at bøta um hetta er at fara frá tankanum um Føroyar sum eitt landafrøðiliga avmarkað øki til at fata Føroyar sum eina politiska og mentunarliga eind - sum eitt "heimsumfatandi netverk av føroyingum", ið eru spreiddir um allan heim, men halda fast við sín føroyska samleika og virka Føroyum at gagni í størri og minni mun.

### Valrætt til føroyingar í útlegd

Annað stig er at geva føroyingum uttanlands formella ávirkan á viðurskiftini í Føroyum við at geva føroyskum útisetum valrætt

*Íslendingar í útlegd hava í dag valrætt í 10 ár, og í Noregi er vælrætturing fyri landsmenn í útlegd 8 ár. Sum føroyingur missur tú har afturímóti valrættin eftir einum degi, um tú fert í uttanlands at arbeiða*

í upp til 10 ár, eftir at teir eru fluttir úr Føroyum. Íslendingar í útlegd hava í dag valrætt í 10 ár, og í Noregi er vælrætturin fyri landsmenn í útlegd 8 ár. Sum føroyingur missur tú har afturímóti valrættin eftir einum degi, um tú fert uttanlands at arbeiða, ella um tú ert lesandi, missur tú valrættin sama dag sum tú fært endaligt prógv.

Í einum globaliseraðum heimi mugu føroysk val vera fyri allar føroyingar - ikki bert fyri teir, sum búgva á einum føroyskum postnummari. Bert við at varðveita valrættin hjá føroyingum í útlegd verður atkvøðubýtið við framtíðar løgtingsval veruliga umboðandi fyri allar føroyingar.

Við at víðka valrættin taka vit eitt stórt stig fram ímóti einum Føroyum fyri allar føroyingar. Valrættur fyri føroyingar í útlegd hevði verið við til at varðveitt eitt sterkt band millum føroyingar heima og føroyingar uttanlands og hevði uttan iva ment støðið á føroyskum politikki frá mangan stuttskygdum lokalpolitikki til størri langsiktaði mál. Eisini virðis- og mentunarpolitikkurin hevði fingið eina saltvatnsinnspræning av, at politisku oyruni ikki longur kundu loyvt sær at vera deyv fyri tí umheimi, sum nógvir føroyingarnir liva í beint nú - og enn fleiri fara at liva í framyvir.

### Altjóða flogvøll

Triðja stig ímóti einum Føroyum fyri allar føroyingar er at gera ferðaumstøðurnar til og úr Føroyum munandi betri. Tíðin er komin at ásanna, at Føroyar broytast ikki grundleggjandi av at sandoyingar sleppa lættari til Havnar. Men Føroyar broytast grundleggjandi av, at føroyingar sleppa lættari úr Føroyum til evropeiskar og amerikanskar stórbýir og øvugt. Eitt nútíðarhóskandi, regluligt og bíligari ferðasamband um ein føroyskan altjóða flogvøll hevði gjørt tað møguligt hjá føroyingum búsitandi uttanlands at virka og arbeitt í Føroyum, eins og føroyingar í útlendskum størvum kundu havt fastan bústað í Føroyum og ferðast ímillum. Ferðasambandið til útheimin má raðfestast sum tann mest umráðandi parturin av føroyska infrakervinum, og um neyðugt mugu flogfeløg, ið eru áhugaði at røkja rutur til Føroya, fáa sersømdir í eina tíð, til

*Trupulleikin fyri Føroyar er ikki at føroyingar fara uttanlands at útbúgva seg, ella at teir búseta seg uttanlands aftaná, men at føroyingar uttanlands eru ov avskornir frá at luttaka í tí, sum fyriferst í Føroyum - og øvugt*

ferðafólkagrundarlagið byrjar at vaksa sum úrslit av betraða infrakervinum.

### 3 neyðug politisk stig

Sum altíð er lætt at vera samdur um, at broytingar skulu til, men ofta gongur meira treyðugt at taka neyðugu stigini til at ítøkiligar broytingar henda. Sum eina byrjan kunnu hesi 3 ítøkiligu politisk stigini takast fyr at Føroyar í framtíðini fáa størri gagn av føroyingum búsitandi uttanlands:

- Føroyar definera seg politiskt sum ein málslig og mentunarlig eind heldur enn bert sum eitt landafrøðiliga avmarkað øki, og allýsingin av einum føroyingi verður broytt hareftir.
- Valrætturin til Føroya Løgting verður broyttur soleiðis, at hann fevnir um allar føroyingar í upp til 10 ára útlegd.
- Infrakervið, sum bindur Føroyar til umheimin, verður skipað soleiðis, at komast kann beinleiðis til og frá einum altjóða flogvølli í Føroyum til í minsta lagi tríggjar útlendskar meginflogvallir tvær ferðir dagliga.

### 3 stig, sum vit øll kunnu taka

Ímeðan vit bíða eftir politiskum dirvi og vilja at fremja hesi neyðugu átøk, kunnu føroyingar, ið vilja síggja avbjóðingarnar í eyguni, leggja seg eftir at hugsa um trý viðurskifti, tá vit seta nýggj tiltøk í verk, fara undir nýggja verkætlan ella leita eftir nýggjum fólki:

- Kann hetta tiltak, hendan mannagongd ella hendan hoyring leggjast soleiðis til rættis, at føroyingar uttanlands hava møguleika at luttaka?
- Kann heimsumfatandi netverkið av føroyingum uttanlands brúkast til at fáa eitt altjóða íkast til hesa verkætlan, hetta lógaruppskot ella hetta menningarátak?
- Kann hendan uppgávan, hetta starvið ella hesin nevndarsesssur røkjast eins væl ella betri av einum føroyingi uttanlands?

Um Føroyar skulu varðveita eina støðu sum framkomið samfelag í globaliseraða heiminum um 20 ár, skulu stórar samfelagsbroytingar fremjast. Men fyrsta stigið er ein hugburðsbroyting millum allar føroyingar um, at bústaður á einum føroyskum postnummari ikki er avgerðandi fyri at luttaka í føroyska samfelagnum.

At fremja hesa hugburðsbroyting eigur at vera næsta stig fyri hvønn einstakan føroying.

*Lesandi, sum koma aftur til Føroya beint eftir lokna útbúgving, oftast eru líka óvitandi um praktisku viðurskiftini innan vinnuna og tað almenna sum tey vóru, tá tey fóru úr Føroyum av fyrstani tíð. Tey flestu høvdu gjørt Føroyum eina stóra tænastu við at verið uttanlands eitt sindur longri*

# Sjálvandi skulu vit halda STsáttmálan um rættini hjá einstaklingum, ið bera brek,

**– Viðmerking til opið brævi frá felagnum Javna**

HELENA DAM Á NEYSTABØ
landsstýriskvinna



Javni ger í fjølmiðlunum vart við, at fólkaskúlalógin er galdandi fyri øll børn, og at munur ikki eigur at verða gjørdur á næmingum, sum bera brek og næmingum, sum ikki bera brek. Har eru vit so púra samd, og eingin ivi skal vera um, at bæði eg og Mentamálaráðið í øllum okkara virksemi virka sambært hesari meginreglu – eisini tá ið tað snýr seg um sparingar.

Henda meginregla um javnstøðu merkir, at børn ið bera brek hava rætt til sama tímatal og eins langan skúladag, sum onnur børn. Óli Wolles greiðir í opnum brævi frá, at hann veit um, at tað eru foreldur, sum hava boðað frá, at skúladagurin hjá barni við breki er styttur, og at orsøkin eru sparingarnar, sum mugu fremjast á fólkaskúlaøkinum næsta skúlaár.

Um so er, at hetta er rætt, so eigur tað at verða broytt so skjótt sum møguligt. Tí tað er á ongan hátt lagt upp til, at næmingar, ið bera brek, skulu bera eina størri byrðu enn onnur børn. Har eru formaðurin í Javna og eg sjálv púra samd.

Allir næmingar hava sambært § 19 í fólkaskúlalógini rætt til ávíst tímatal um vikuna, og er tað ábyrgdin hjá skúlaleiðslunum í samráð við Sernámsdepilin og NSR tænasturnar at tryggja, at allir næmingarnir fáa ásetta tímatalið. Tímatalið hjá einstøkum næmingi kann bert lækkast í serstøkum føri og skulu foreldur og skúlaleiðsla verða samd um hetta. Ein tílík avgerð skal eisini góðkennast í Mentamálaráðnum.

Tað er rætt, at Mentamálráðið hevur tillutað skúlunum færri tímar skúlaárið 2010/2011 enn í 2009/2010. Men vit hava lagt dent á ikki at skerja miðfirraðu tímarnar til serundirvísing og at varðveita tímarnar, sum eru markaðir til tvílæraraskipanina. Hetta er júst fyri at tryggja, at so nógvir næmingar sum til ber kunnu taka lut í einum inkluderandi læriumhvørvi.

Tað er eisini rætt, at Sernámsdepilin fyrerikar virksemið sítt næsta skúlaár, og at samráðingar eru við skúlarnar um tillutan av tímum til serligan tørv. Játtanin til Sernámsdepilin í 2010 er ikki skerd, men kortini hevur tað heldur ikki í ár borið til at nøkta samlaða tørvin á tímum til serundirvísing.

Eg veit, at Sernámsdepilin og NSR-tænasturnar leggja nógva orku í at skipa virksemið sambært fakligum tilráðingum og við atliti til at gagnnýta játtanina so væl sum til ber. Hin vegin er eisini neyðugt at vísa fyrilit og ikki gera ov stór og ógvislig inntriv í einum, sum hin einstaki næmingurin ella skúlin kann hava ilt við at laga seg til.

Eg eri sannførd um, at Sernámsdepilin fer at greiða frá, hvussu ætlanin er at tryggja øllum næmingum, sum bera brek, bestu umstøður, sum eisini er í samsvari við teir ST-sáttmálar, sum vit hava samtykt. Eg fari at taka stig til at bjóða leiðsluni í Sernámsdeplinum á fund saman við felagnum Javna, har vit í felag umrøða teir spurningar, sum Javni ber fram í opna skrivi sínum.